# FISKAALING P/F

Aquaculture Research Station of the Faroes

FISKAALING

## VIT MENNA ALIGRANSKING

**VISIÓN FISKAALINGS** er at økja um dygdina í føroyskari aling við gransking og menning á altjóða støði. Felagið leggur dent á altjóða granskingarsamstarv við granskingarstovnar og vinnulív. Høvuðsgranskingarøkini, vit ynskja at menna, eru:

- Aling av fiski og øðrum sjódjórasløgum
- Aling á streymasjógvi
- Fóður, vatn og framleiðsluhættir
- Íløgugransking og biotøkni
- Matvørugóðska úr aldum fiski
- Sjúkufyribirging, fiskaheilsa og aliumhvørvi

Áhugin fyri toskaaling er vaksin munandi tey seinastu árini í londunum rundan um okkum. Fiskaaling hevur tí ment eina royndarframleiðslu av yngli undan toski av føroyabanka, ið er kendur fyri sínar góðu vakstrareginleikar og góðu eginleikar annars. Íløgur og vakstrareginleikar hjá toski av føroyabanka og landgrunninum verða nú nærri kannaðir í nýggjari Ph.D.-verkætlan "Genetic studies of Atlantic Cod".

Vit menna royndar- og starvsstovuumstøður til altjóða støði. Innan ílegugransking hevur Fiskaaling bygt eina framkomna starvsstovu við útgerð til íløgukanningar av føroyskum alitilfari. Nú verður starvsstovan eisini víðka til at umfata góðskukanningar av aldum fiski. Næsta stig er at seta í gongd gransking innan framleiðsluhættir og aliumhvørvi við feltroyndum og teldumodellum.

Á Fiskaaling starvast tríggir granskarar við granskaraútbúgving, ein Ph.D.-lesandi, umframt tvey fólk við kandidatútbúgving. Eisini eru tveir granskarar uttanlands knýttir til felagið. Harumframt starvast 14 fólk við drúgvum royndum og ymiskum útbúgvingum innan røkt, lívfiskaarbeiði og framleiðslu á Fiskaaling.

Fiskaaling framleiðir tosk, síl og laks og selur rogn og yngul til føroysku alivinnuna.

Góðskustýringin á Fiskaaling er góðkend av Det Norske Veritas eftir altjóða standardinum ISO9001:2000. Skipanin umfatar tilgongdir, framleiðslustýring og eftirlit, og áherðsla er løgd á góða verkætlanarstýring innan gransking og menning, og á lívfrøðiliga trygd innan lívfisakaarbeiði, rogna- og yngulframleiðslu.

ISO 9001: 2009 Góðkent









FISKAALING PF. · VIÐ ÁIR · FO-430 HVALVÍK · TEL. +298 474747 · FAKS +298 474748 · E-MAIL FISKAALING@FISKAALING.FO · WWW.FISKAALING.FO

www.veitarin.fo
www.kemilux.fo

**KEMILUX eginframleiðsla:**

S1 Extra
S2 Extra
Rustloysari
Rustvask
H79
H80
HG2 Extra
Oljureins
Sildavask
Virkisskúm

Vit framleiða eftir altjóða ISO:9001 góðskuskipanini

KEMILUX eru skrásettir hjá Achilles sum góðkendur veitari til m.a. oljuvinnuna

# KEMILUX SIRIUS:

# Sjálvsagdi VEITARIN til føroysku alivinnuna

Vørur og tænasta frá Kemilux Sirius hava staðið sína roynd í krevjandi aliumhvørvinum.

Tosið við okkum um røttu loysnina til tykkara tørv.
Umframt reingerðarevni og -amboð hava vit eisini stórt úrval innan t.d. pakkning/pakkiamboð, tilsetingarevni og arbeiðsklæðir.

Veitarin
KEMILUX SIRIUS

Á Sandvíkarhjalla - tlf. 350830 - Má-frí 8-16

Í okkara nýggja, snotiliga handli á Hjalla fært tú alla framleiðslu frá Kemilux, umframt mangt annað til húsarhald, vinnu og stovnar




MJ MEDIA TLF 219776